# Øðrvísi undirvísing í Eysturskúlanum

**Í fyrsta og øðrum flokki í Eysturskúlanum í Havn eru karmarnir um undirvísingina rættiliga nógv øðrvísi enn á flestu støðum. Vit hava vitjað í 1. flokki, har 37 børn eru í sama flokki, ið tríggir lærarar hava ábyrgdina av. Lærararnir hava rættiliga fríar teymar og avgera í størstan mun sjálvir, hvussu tímatalvan sær út. Lærararnir arbeiða í einum sokallaðum sjálvstýrandi toymi.**

BØRN OG SKÚLI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Børnini í Eysturskúlanum í Havn hava onga fasta tímatalvu. Lærararnir, ið eru tríggir í tali, eru eitt sjálvstýrandi toymi, ið hvørja viku ger av, hvat børnini skulu gera næstu vikuna. Børnini fáa ein vikuseðil við sær heim hvønn fríggjadag, ið er ein ætlan fyri komandi vikuna, so foreldrini kunnu fylgja við í, hvat gongur fyri seg í skúlanum.

Tað eru altíð tveir ella tríggir lærarar inni í stovuni, og hetta halda lærararnir vera gott, tí á henda hátt er pláss fyri, at ein lærari undirvísir og hinir hjálpa til á ymsan hátt, so alt fæst at rigga sum best. Tískil verður undirvísingin sjáldan avbrotin.

Lærararnir eru ótrúliga væl nøgdir við alternativa undirvísingarkarmarnar og meta, at skipanin hevur bestu umstøður at røkka bæði veiku og sterku næmingunum frá fyrsta degi.



*Hvønn dag klokkan 9.40 fáa børnini mjólk at drekka. Tá sita øll saman á trappuni og lurta eftir eini søgu*

### Øðrvísi skúlastova

Skúlastovan hjá børnunum í Eysturskúlanum í Havn er somuleiðis rættiliga øðrvísi. Tvær stórar skúlastovur eru koyrdar saman, ið síðani aftur eru býttar upp í fýra stovur. – Eina »stillastovu«, eina »vanliga skúlastovu«, eina »uppihaldsstovu« og eina »lærarastovu«.

Í uppihaldsstovuni gongur eisini undirvísing fyri seg. Her sleppa næmingarnir at sita, liggja, sum teir hvør í sínum lagi vilja, ella arbeiða í toymi og tosa saman um arbeiðið. Tey kunnu eitt nú sita í trappum, liggja ella sita á gólvinum, við eitt borð ella hvat tey nú hava hug til ella finna uppá. Hóast børnini sita í øllum ættum og á ymsan hátt, syrgja lærarnir fyri, at øll fáa arbeiðsfrið og at fáa nakað burturúr. Men í uppihaldsstovuni ber eisini til at dansa og spæla sjónleik, men ikki tá tey skulu læra at lesa, skriva ella rokna.

Í stillustovuni sleppa næmingarnir at arbeiða í friði og náðum; har skal vera fullkomiligur friður. Stillastova verður eisini nýtt til fundir millum lærarar og næmingar. Í dag hevur ein lærari næmingasamrøður inni í hesi stovuni, meðan ein annar arbeiðir við føroyskari skriving saman við børnunum í hinum stovunum, sum tó eru sum ein sera stór stova tilsamans. Í stillastovuni verður í dag prátað um trivnaðin hjá barninum, og hvussu tað klárar seg fakliga í skúlanum. Børnini hava fingið hvør sítt spurnarskjal heim við sær, ið tey sjálv, foreldrini og lærararnir so fylla út. Í einum øðrum parti av stóru skúlastovuni er eisini ein "lærarastova". Har sleppa børnini ikki at vera. Har leggja lærararnir undirvísingina til rættis og hava síni ting.



*Bjørn vísir okkum eina av talvunum, ið á ein hátt eisini er eitt sindur alternativ. Hon er á tveimum hurðum: – Hetta er eingin vanlig talva, men hon riggar væl. Her læra lærararnir okkum at skriva og rokna, sigur Bjørn*



*Tá børnini eru liðug at skriva ella at rokna í eini bók, fáa tey eitt stjørnustempul. Jana er júst liðug við sína føroysku skrivibók:*
*– Hetta er fyrstu ferð, eg fái eitt so vakurt stjørnustempul, tað eri eg ordiliga glað fyri. Nú kann eg endiliga byrja upp á næstu bókina og læra meg okkurt nýtt, sigur ein fegin og stolt Jana*



# Best at liggja undir borðinum og arbeiða

Tá undirvísingin byrjar, seta børnini seg júst har, tey vilja arbeiða. Undir einum borði liggja Heidi, Kasandra og Randi og skriva í eina bók:

– Vit sleppa at seta okkum har, vit vilja. Beint nú læra vit okkum at skriva føroyskt, siga tær og eru samdar um, at tað er nógv betri at liggja undir borðinum og arbeiða, heldur enn altíð at sita á einum stóli við eitt skúlaborð:

– Her fáa vit betri frið, og larmurin frá hinum børnunum órógvar okkum als ikki. Vit liggja ikki altíð á gólvinum og arbeiða, men onkuntíð sita vit eisini á trappunum ella á borðinum og skriva, lesa ella rokna. Tað er gott at arbeiða í bólki saman við øðrum børnum, men onkuntíð velja vit eisini bara at sita einsamallar og arbeiða í friði og náðum, siga tær.

**- horsdal**